TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## BYGGIFRØÐINGUR/ VERKFRØÐINGUR

Við tað at eitt av starvsfólkunum á byggi- og býarskipanardeildini fer í farloyvi í 1 ár, verður søkt eftir byggifrøðingi/verkfrøðingi til byggimálsviðgerð o.a. at byrja beinan vegin.

**Høvuðsuppgávur**
- byggimálsviðgerð,
- byggieftirlit,
- fyrireika mál, ið skulu leggjast fyri byggi- og býarskipanarnevndina, og skipa fyri avgreiðslu av nevndar- og býráðssamtyktum,
- samskifta við borgarar, feløg og stovnar.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal verða útbúgvin byggifrøðingur/ verkfrøðingur ella hava aðra viðkomandi útbúgving. Umsøkjarin skal duga væl føroyskt í skrift og talu og hava hollan kunnleika til telduforritini MS Office, AutoCad/Microstation GeoOutlook.

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at umsøkjarin dugir væl at leggja arbeiðið til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og er til reiðar at luttaka í øðrum arbeiði á deildini enn omanfyri nevnt.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett beinan vegin ella skjótast til ber. Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv , ið er fakliga og persónliga mennandi við góðum arbeiðsumstøðum.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Ova Mortensen, býararkitekt, ella Marius Müller, tekniska stjóra, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 08.10.2001. Viðmerk á umsóknina "starv á byggi- og býarskipanardeildini".

SNARSKIVAN

FÓLKADANSUR

## Fólkadansur í bygdarhúsinum í Hósvík



Í vetur verður dansað í bygdarhúsinum í Hósvík sunnukvøld kl. 19.00

Byrjað verður 30. september

Kostnaður fyri veturin kr. 400,00 pr. par

Lærarar eru Matilda og Tom Nielsen

Tilmelding á telefon 42 22 91 ella 42 24 25

Øll eru vælkomin!

## Lærlingur

Stendur áhugi tín til elektronik og teldutøkni, kunnu vit bjóða tær lærupláss sum elektromekanikari.

Vit hava fjølbroyttar uppgávur bæði á sjógvi og landi. Neyvari upplýsingar fáast við at skriva ella ringja til okkum

**Met spf**
J. C. Svabosgøta 8 · 100 Tórshavn
Tlf. 317265 · e-postur: tom@navtech.fo

## SKALT TÚ MÁLA?

Lat okkum mála fyri teg!



**Eyðun Jacobsen**
Málarameistari
Glyvrar
Tlf. 448355
Fartlf. 226504

Sosialurin 311820

## Dagrøktin í Vági

Dagrøktarskipanin í Vágs kommunu søkir eftir dagrøktara at byrja skjótast gjørligt.

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert starv, har tú kemur at arbeiða saman við øðrum dagrøktarum í dagrøktarhúsinum 2 dagar um vikuna.

Vit ynskja at umsøkjarin hevur umstøður at ansa eftir børnum g kann skapa ein tryggan, fjølbroyttan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Irdi Bjarkhamar, dagrøktarleiðara, á tlf. 373755.

**Dagrøktarskipanin í Vágs kommunu**
Tlf. 373755 · 228442

## Fiskamerkir

Seinasta freist at lata fiskamerkir inn, sum skulu luttaka í lutakasti um 10.000 kr., er 28. sept. 2001.

**Fiskirannsóknarstovan**
Nóatún 1
100 Tórshavn

## Høvuðsreingerð

Dugnalig kvinna søkist beinanvegin til privat hús í Havn.

Skriva til:
**Sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn
**Bill. mrk. 180-9**

## Maskinsmiðir

Søkt verður eftir maskinsmiðum til ymiskt smiðjuarbeiði, at byrja skjótast gjørligt.

Løn eftir nærri avtalu.

Søkt verður eftir einum lærlingi til maskinsmið, at byrja skjótast gjørligt.

P/F TANGAVIRKIÐ

Tlf. 298 373065 · Fax +298 373934
FO-900 Vágur

## Parabol

Leiga analog móttakara og kort til:
m.a. TV3 Danmark – TV3 Norge – TV3 Sverige – TV Norge og NRK fyri 150 krónur um mánaðin.

**GF Elektronik**
Birnugøta 31
Tlf. 310254
Mobil 210254

## Til allar seyðamenn!

Teir, sum ynskja broytingar í skamtatali til koppingarevni fyri garnasótt, kunnu boða Tjaldurs apotekinum frá á **tlf. 341100**.

**Tjaldurs Apotek**

www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo

Mánadagin 24. september

letur húðrøktarstovan

# FANGO

v/Sólvu Jacobsen upp í J. Paturssonar gøtu 18
(har sum DELTA var fyrr)



Móttøka verður frá kl. 14-19

ARTDECO THE TRENDSETTER COMPANY
PHYRIS

ANDLITSVIÐGERÐ
MANICURA
PEDICURA
KROPSVIÐGERÐ
BENDING AV VIPPUM
VOKSVIÐGERÐ
SMYRSL

HÚÐRØKTARSTOVAN FANGO

J. Paturssonar gøta 18 · Tlf: 31 20 21

## Fulltrúi

**Eitt starv sum fulltrúi í Vinnumálastýrinum er leyst at søkja**

**Høvuðsuppgávur:** Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru:
- At ráðgeva landsstýrismanninum og stjóranum
- At gera uppskot til lógir og kunngerðir
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð

**Krav til starvið:** Vit hava hugsað okkum, at tú hevur útbúgving sum cand. jur. ella líknandi, og hevur góðan kunnleika til edv. Tú skalt eisini duga væl føroyskt og enskt, og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunnu bjóða:** Starvið, sum til tíðir er strævið, er samstundis sera áhugavert við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti úteftir. Vit kunnu bjóða:
- Flex-tíð
- Sjálvstøðugt starv
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

**Setanartreytir:** Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið.

Viðmerkjast skal, at setanin umfatar Vinnumálastýrið og stovnar undir tí, umframt løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

Umsókn við prógvum o.ø. skal sendast til:

**Vinnumálastýrið**
**Postrúm 377**
**110 Tórshavn**

**Freist:** Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. oktober 2001. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Arna Poulsen, tel 35 60 60.

team85

VINNUMÁLASTÝRIÐ

Frá Vesturkirkjuni

## Kunngerð um kirkjuráðsval

Hervið verður gjørt kunnugt, at kirkjuráðsval verður í Tórshavnar vestaru kirkjusókn **týsdagin 6. november 2001**. Valið fer fram í kirkjukjallaranum nevnda dag frá kl. 10-12 og 16-20.

Valevnislistar skulu vera formanninum fyri valstýrinum, **Signar Dam**, í hendi í seinasta **lagi 9. oktober kl.19,00**. Valevnini mega í mesta lagi vera 17, og skulu minst 3 og í mesta lagi 15 veljarar sum stillarar undirskriva listan. Høvuðstreytin fyri valrætti er, at ein og hvør, sum er limur í fólkakirkjuni, og sum fyllir 18 ár í seinasta lagi valdagin 6. november 2001, hevur valrætt. Skilað verður til, at veljast skulu 11 limir.

Markið millum Tórshavnar Vestaru og Tórshavnar eystaru kirkjusókn er Tróndargøta — Varðagøta — Villingardalsvegur.

Øll valevni skulu geva skrivliga váttan um, at tey vilja lata seg stilla upp, og hava tey ikki sitið í kirkjuráði áður, at tey eru sinnað at undirskriva ta váttan, sum kravd verður, áðrenn tey á fyrsta sinni kunnu taka sæti í kirkjuráðnum.

Formaðurin fyri valstýrið verður at hitta í kirkjukjallaranum 8. og 9. oktober, báðar dagar frá kl. 18-19. Annars á telefon nr 31 6393.

Tórshavn hin 21. september 2001.

**Valstýrið fyri Vesturkirkjuna**

www.sosialurin.fo

## Dagrøktari

Søkt verður eftir dagrøktara fyri dagrøktara í barnsburðarfarloyvi at byrja 1. okt.

Umsóknir skulu vera dagrøktini í hendi í seinasta lagi 24. sept.

**Dagrøktaskipanin í Viðareiðis kommunu**
750 Viðareiði
tlf. 451241

## Leiga av fimleikahallunum

Tey, ið ætla at leiga fimleikahallirnar (á Glyvrum og í Søldarfirði) veturin 2001/2002, skulu senda skrivliga umsókn til býráðsskrivstovuna í seinasta lagi 28/09-2001.

**Runavíkar býráð**

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Land Rover Freelander 2,0 LN, 5 hurðar og 5 gear
**Árg.:** 1999
**KM.:** 55.200
**Eyka útgerð:** El-rútar framman, el-sóltak, sentrallás og sportsfelgur.

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Bjartur Brekkstein
tlf. 345600 - lokal 345771 - fartlf. 215771
fax nr. 345607
at hitta millum kl. 08.30–10.00.

## Ford Focus Ghia

- Motorur 1600i
- Fra december 1998
- ikki roykjarabilur
- hiti í setrunum
- el-rútar



**Kostnaður kr 110.000**

Ring tlf 223369